Almannaverkið tørvar 3-4 nýggjar persónbilar í tað sum verður nevnt “polo klassa”

Bilar kunnu verða bensin/dissel ella eletriskir. Almannaverkið tekur støðu til hetta, tá ið vit síggja prís og útboð. Veitarin verður tí mæltur til at bjóða báðar møguleikar. Plug-in-hybrid og hybrid, hevur ikki áhugað.

Treytirnar eru fylgjandi

- Bilurin skal nýtast í samband við borgarar sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum skulu koyrast. 3-4 vaksin fara at brúka bilin.
- Bilurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar. Elektriskir bilar mugu hava nøktandi battarí støðd.
- Bilurin skal hava automatisk gear.
- Støddin á bilinum skal verða í “polo klassanum”
- Levering: Bilurin skal leverast Almannaverkinum, seinast í januar 2023, helst fyrr.
- Litur: Bilurin skal verða koksgráur / myrka gráur. Svart ella hvítt gongur, men gevur lægri stig.
- Almannaverkið krevur at veitarin stendur fyri allari service, eftirlit og líknandi, á egnum verkstað, ella á verkstað sum veitarin hevur formella samstarvsavtalu við.
- MVG upphædd skal upplýsast

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Upplýsast skal, at tað kann henda at Almannaverkið hevur tørv á fleiri bilum tá ið vit taka av tilboð, og tá tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar, uttan at tað verður boðið út av nýggjum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Almannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

- Prísur 60 %

- Egnaður til endamál 20 %

- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til hallurt@av.fo. Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi dagin innan freistina at lata inn tilboð. Spurningar frá og svar til hvønn einstakan veitara verða

lýst á Keypsportalinum, sum partur av útboðstilfarinum. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1-2 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. nov 2023 kl. 10.00.

Tilboðið skal sendast við telduposti til hallurt@av.fo